# Gallarí Jinx



Verkstaðið á Brekku

hevur framsýning í mai 2005

tel 317101 • jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800

# ShapeWorks™

Independent Distributor

**Við hjálp frá shapeworks ber til at regulera tey óynsktu kiloini**

- einfalt og nemt
- orku og yvirskot
- úrslit



Tú fært alla tað vegleiðing og stuðul tær tørvar.

Um hetta ljóðar áhugavert, so ring fyri at hoyra nærri.

**Daniela & Willi Olsen**

TEL 422367 · WWW.NYGGJANFIGUR.NU

*sjálvstøðugir Herbalife forhandlarar*

Sosialurin 341800

# X-Size søkir ekspedient m/k

Hevur hetta tín áhuga og ert tú:

álítandi og hjálpsamur,
fyrikomandi og kundavinarligur,
arbeiðssamur og sjálvstøðugur

so send okkum skrivliga umsókn innan 17. mai.

Best er um tú hevur útbúgving ella royndir.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja á tlf. 227607.



**Sverrisgøta 17 · 100 Tórshavn**

## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 17. juni 2005, kl. 13.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 265, Froðba, Uppi á Húsi á Hvítanesi, 800 Tvøroyri,** (AS 2-23/2005).

Ognin er í 3 hæddum, hvør hædd uml. 43 m². Miðhædd: gangur v/ trappu uppá loft, stova og køkur. Loft: 1 kamar v/ kvisti, 1 kamar, baðiverilsi v/ brúsu og wc, gangur v/ skápum. Kjallari: Kjallararúm v/ oljufýr og vaskimaskinu. Stykkið er 240 m².

Tvingsilssølan er umbiðin av **Julionnu Klett, advokati, Bringsnagøta 15, 100 Tórshavn, tlf. 311744 (j.nr. 88820),** sum kann geva upplýsingar og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Søluuppgerð kann fáast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**

hin 4. mai 2005

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 1140,** Sp/f ADS-grannskoðan, 826 Trongisvágur.
**Viðtøkur broyttar:** 14.03.2005
**Nýggj hjánøvn:** Sp/f Suðuroyar Grannskoðarasova (Sp/f ADS-grannskoðan), Sp/f ADS- revision (Sp/f ADS-grannskoðan), Sp/f ADS-accountancy (Sp/f ADS-grannskoðan)
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Amy Bech, 926 Lopra (nevndarformaður)
**Innkomin í nevndina:** Niels Olaf Eyvindsson, 850 Hvalba (nevndarformaður)

Skráseting Føroya
tann 03. mai 2005

Kristin Balle

# Lesið Sosialin

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:



**Býlingshúsið í Maritugøtu**

Í løtuni eru tríggjar vøggustovustovur við tólv børnum í hvørjari. Í august 2005 verður ein vøggustovustova lutvíst broytt til eina barnagarðsstovu við 16 børnum í hvørjari. Trettan starvsfólk arbeiða á stovninum

### Býlingshúsið í Maritugøtu eftir:

- einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 8.august 2005 ella eftir nærri avtalu. Vøggustovan verður broytt til barnagarðsstovu í august 2006.
- einum pedagogi til barnagarðsstovu við 16 børnum at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 8. august 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Ingu-Mariu Amandusardóttir, stovnsleiðara, tlf. 302400 ella 272929.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum í Maritugøtu, Maritagøta 50, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. mai 2005.



**Dagstovnurin á Landavegnum**

Á stovninum eru fýra vøggustovustovur við tólv børnum í hvørjari stovu.

Fimtan starvsfólk arbeiða á stovninum.

### Dagstovnin á Landavegnum eftir:

- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 8. august 2005 ella eftir nærri avtalu.
- tveimum pedagogum at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 8. august 2005 ella eftir nærri avtalu.

Tvær av stovunum verða broyttar til barnagarðsstovur seinni

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Kirstin Djurhuus, stovnsleiðara, tlf. 302380 ella 272949.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum á Landavegnum, Landavegur 84, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. mai 2005.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

# Koyri-kort?

Teoriskeið til motorsúkklu **mánadagin 09.05**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 21. apríl 2005 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at F-vinnuøki á Oyrareingjum verður broytt til B1 havnaøki.

Broytingin umfatar matr. Nr. 257c, 257d, 265, 266, 268, 269 og 343

Tilfar, sum lýsir broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 9. mai til og við 27. mai 2005, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 9. august 2005.

SNARSKIVAN